

Her Rúni M. Hansen saman við táverandi ovasta stjóranum í Statoil, Helge Lund, sum í dag er stjóri í BG. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Føroyingar á altjóða pallinum

**Jan Müller**

13.07.2015 - 16:44

Oljan.fo

Tað er alt meira vanligt, at føroyingar gera seg galdandi á altjóða pallinum. Ein teirra er føroyski stjórin í Statoil, Rúni M. Hansen, sum hevur arbeitt innan altjóða vinnu í nógv ár, og sambært víðagitna felagsskapinum "World Economic Forum", so er hann fyrsti og einasti føroyingur, ið er partur av hesum felagsskapi. Rúni M. Hansen, sum hevur havt ábyrgdina fyri leiting í Norðuratlantshavi tvs. Føroyum og Grønlandi seinastu árini, er eisini uppi á ovastu rók í Statoilskipanini, har hann er leiðari av arktisku deildini hjá felagnum. Hann er eisini partur av leiðsluni í altjóða leitideildini hjá Statoil.

Hesin felagsskapurin man verða ein av teimum mest kendu og prestigufullu innan sítt øki í heiminum í dag. Vit kenna hann m.a. frá árligu fundunum í Davos í Schweitz, har stjórnarleiðarar sum Angela Merkel og Barak Obama saman við fleiri vinnulívsfólkum luttaka. Í oktobur í ár er aftur ein toppfundur á skránni í Abu Dhabi, har mest viðkomandi

leiðarar í heiminum saman viðgera ymisk evni. Rúni M. Hansen, sum sambært heimasíðuna hjá felagsskapinum, hevur verið við til fleiri av fundunum, verður uttan iva eisini við til tann fundin.

The World Economic Forum er ein altjóða felagsskapur, sum hevur sum endamál at betra um umstøðurnar á ymiskum økjum við góðum almennum og privatum samstarvi. Eftir hvat skilst, so hevur Rúni M. Hansen verið partur av hesum felagsskapi í 3 ár.

Tað er gjøgnum hansara starv í Statoil, at hann luttekur í World Economic Forum í millum annað bólkinum um Arktis, orku og heimsbúskap, men hann hevur eisini verið virkin í bólkinum fyri nevndarformenn, har millum annað nevndarformenninir í Nestlé, Bloomberg, Deutsche Bank og øðrum altjóða fyritøkum eru við. Rúni M. Hansen er nevndarformaður í Bakkafrost.

Á heimasíðuni hjá World Economic Forus, http://www.weforum.org stendur m.a. um Rúna: "Rúni M Hansen is a Faroese national who is the Head of Statoil's Arctic Unit and member of Statoil´s worldwide exploration management team. He has had extensive experience of the international oil and gas industry. For a number of years he has been the country manager for Statoil in charge of operations in the Faroes and Greenland, including operated drilling campaigns. He has also been the manager of Commercial and Negotiations for Europe and North Africa in Statoil. Rúni M. Hansen is the Chairman of the Board of Directors of the Oslo Stock Exchange (OSE) listed company Bakkafrost. He is a member of the World Economic Forum´s Global Agenda Council on the Arctic. He holds a MSc in Economics and Business Administration from Copenhagen Business School and a DBA from the Management School of Lancaster University."




